## Við hamara eftir bussførara




Tað kundi gingið heilt galið, tá ein fullur 46-ára gamal í gjárkvøldið legði eftir bussføraranum, meðan bussurin koyrdi. Maðurin tók ein neyðhamara í bussinum, og ætlaði at sláa bussføraran í høvdið við honum. Tað kundi verið verri. Ein slíkur hamari er spískur í endunum og kundi gjørt skaða á bussføraran so hesin misti tamarhaldið á bussinum. Lukkutíð legði ein annar maður upp í leikin og felti fulla mannin í dúrkið, har hann og ein annar maður hildi áleyparanum til løgreglan kom.

## Barnaklandur endaði við drápsroynd

Klandur millum tvær smærri gentur í Mjølnerparken í Keypmannahavn útartaði seg, tá páparnir løgdu uppí. Tað endaði við, at ein 42-ára gamal maður í dag møtir fyri rættinum ákærdur fyri drápsroynd. Hendingin fór fram sunnukvøldið, tá ein pápi vildi sissa børnini, men úr vindeyganum sá ein annar pápi henda fyrra skelda dóttrina. Hann gjørdi ikki mætari enn at taka ein knív og niður í garðin. Í síðstu løtu fekk ein triði maður skumpa knívmannin til viks.

# Harmir at missa loyvið

**Tað vísir seg at vera ógjørligt at fáa fiskiloyvi til Sunbeam, tí hann er 4% størri enn Sancy. Tí sær reiðaríið sær ongan annan møguleika enn at royna at selja bæði skipini, og harvið lata fiskiloyvið av hondum**

FISKILOYVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Sunbeam var ætlaður at koma í flotan fyri Sancy, sum er gamalt og ótíðarhóskandi - og alla tíðina í ólagi. Hesum hevur Fiskimálaráðið forðað fyri*

Fyrr í vár keyptu vágbingar skipið Sunbeam. Hetta var ætlað sum ein avloysari til Sancy, sum er uppslitin og alla tíðina í ólagi.

- Vit keyptu skipið, tí treytirnar vóru so sera góðar. Líka síðani hava vit roynt at fingið fiskiloyvi til Sunbeam, sum vit ætlaðu skuldi koma í flotan fyri Sancy, men har hevur alt verið vónleyst at finna loysn á málinum, sigur Hans Joensen, vanliga nevndur Hans í Líðini.

Sancy hevur riggað ógvuliga illa. Tað hevur verið umvæling omaná umvæling, og nú var tað so komið hartil, at einasta loysnin var, at skifta skipið út. Og tí varð Sunbeam keypt.

Men Fiskimálaráðið hevur ikki verið til at høgga ella stinga í. Djúpvatnstrolarar eru ikki nevndir í kunngerðini um vinniligan fiskiskap, og so hava teir nýtt lógina sum umfatar skip undir fiskidagaskipanini. Eftir teirri lógini verður støddin roknað út eftir long x breidd x dýpd x motororku, sigur Hans í Líðini.

So hóast Sunbeam er merktur 803 BRT og Sancy 826 BRT, verður Sunbeam eftir útrokningini mettur størri enn Sancy. Munurin er tó bert 4%, og hóast kunngerðin, sum Fiskimálaráðið gongur eftir, heimilar eitt frávik upp á 17%, so er hetta ein regla, sum Fiskimálaráðið sær púra burtur frá.

### Sancy í lagi

Tað margháttliga við øllum er, at tað als eingin trupulleiki er at seta tvífalt so stóran motor í Sancy, eins og tað er í fínasta lagi at seta tvífalt so sterk spøl í skipið, og tað skilja vágbingar lítið av.

- Trupulleikin er jú tann, at Sancy er gomul og slitin, so tað er sjálvandi eingin loysn fyri okkum, tí tá skulu hópurin av pengum á borðið, og vit hava framvegis eitt gamalt ogótíðarhóskandi skip, sigur Hans í Líðini.

Hann er bangin fyri, at hendan avgerðin hjá Fiskimálaráðnum verður at meta sum fordømi, og so verður eingin djúpvatnstrolari skiftur út aftur. Úrslitið verður, at vit fara at hava ein gamlan og útslitnan djúpvatnsflota, tí einasti møguleikin er at skifta út til minni og kanska verri skip.

Men tað, sum harmar eigararnar mest er, at teir við hesum verða noyddir at lata fiskiloyvið fara av fjørðinum. Tað er ein smeitur, men hinvegin kunnu teir ikki blíva við at lata skipini liggja við kei. Tí tað kostar hvønn dag.

- Í løtuni eru eitt línuloyvi, eitt partrolaraloyvi og níggju djúpvatnsloyvi í Suðuroynni. So tað er týðiligt, at vit suðuroyingar hava dúvað upp á djúpvatnsflotan. Skal hann nú minka, tí skipini ikki kunnu skiftast út, so verður helst svangligt hjá nógvum, heldur Hans í Líðini.

### Selja

Í Sosialinum í dag er tískil lýsing við bæði Sancy og Sunbeam, sum eru settir til sølu. Hóast tað harmar eigararnar almikið, so síggja teir sær ongan annan møguleika í løtuni.

- Sancy hevur umfatandi umvælingar fyri neyðini. Skipið er 30 ára gamalt, og hevur verið ein kleppur um beinini hjá mongum reiðarium. Í veruleikanum hevur skipið koyrt fleiri reiðarí á heysin, sigur Hans í Líðini.

So sjálvt um motorurin á Sunbeam er plomberaður, vil Fiskimálaráðið ikki góðtaka tað. Eisini hevði gamla Sancy størri motor enn núverandi, 1800 hestar móti 1500. Og sum nevnt hevði eingin trupulleiki verið at sett størri motor í Sancy.

- Tað hevði fyri okkum verið óhugsandi at tikið plombuna úr motorinum á Sunbeam, tí oljan er so mikið dýr, at tað hevði ikki lønt seg fíggjarliga. Men Fiskimálaráðið er hvørki at høgga ella stinga í, og tí er einasta loysnin at royna at selja bæði skipini, hóast tað er ógvuliga harmiligt, sigur Hans í Líðini.

Hannn dylir heldur ikki fyri, at teir hava brúkt nógvar pengar upp á hetta projektið, og hóast reiðaríið er væl fyri hvat eginpeningi viðvíkur, so hevur eingin ráð at lata skip liggja við kei í mánaðsvís.

- Men tað er við ringum tannabiti, at vit lata fiskiloyvið fara av fjørðinum, leggur Hans í Líðini dent á.